## FM fyri tey yngru

Næsta leygardag, 27. februar, verða FM-kappingar í flogbólti í Havn fyri Kidsvolley (level 1 og 2), gentur og dreingir 10 ár, gentur og dreingir 12 ár, umframt kvinnu- og mansunglingar. Eydnast at fáa hallir fríggjakvøldið 26. februar, fara unglingaliðini at spæla tá.



## Rás 2 sigur frá

Tá steypafinalurnar í flogbólti verða spældar í morgin, fer Rás 2 at hava beinleiðis frásøgn frá báðum finalunum. Frásøgumaður verður Hilmar Jan Hansen, sum hevur Mariann Øster við sum viðmerkjara í kvinnufinaluni og Suna Hansen í mansfinaluni. Sendingin byrjar klokkan 13.

# Eik og Atlantsflog stuðla flogbóltinum

**Í gjár longdi Flogbóltssamband Føroya stuðulsavtalur sínar við bæði høvuðsstuðulin, Eik Banka, og hjástuðulin, Atlantsflog, so tær eru galdandi næstu tvey árini**




Hilmar Jan Hansen

Síðstu 11 árini hevur Eik Banki verið høvuðsstuðul hjá Flogbóltssambandinum, og samstarvið við Atlantsflog sum hjástuðul hevur verið síðstu trý árini. Tá sáttmálarnir verða longdir, plagar tað at verða gjørt í sambandi við steypafinalurnar, men hesa ferð vórðu undirskriftirnar framskundaðar, tí onkur av undirskrivarunum er burturstaddur í morgin, tá finalurnar eru.

Ístaðin hevði Flogbóltssambandið boðsent fjølmiðlum á Hotel Føroyar, har allir partar aftaná fegnaðust um, at samstarvið heldur fram. Eik Banki, sum er høvuðsstuðul, og Atlantsflog, sum er hjástuðul, róstu Flogbóltssambandinum fyri gott arbeiði, samstundis sum Flogbóltssambandið takkaði stuðlunum fyri trúfesti og hugin at halda fram við stuðlinum.

– Vit hava verið øgiliga glaðir fyri samstarvið, tí flogbólturin fevnir so breitt. Flogbóltssambandið er væl skipað og ger eitt gott arbeiði millum børn, ung og tilkomin, og vit føla eisini, at vit fáa nakað afturfyri, sigur Ólavur Jensen, sølu- og marknaðarleiðari í Eik Banka.

Tað sama sigur Jákup Sverri Kass, sølu- og marknaðarstjóri í Atlantsflogi: – Flogbóltssambandið er væl rikið og hugsar frameftir, samstundis sum úrslit verða rokkin. Eisini vit halda, at vit fáa nakað afturfyri, samstundis sum vit ásanna tann týdning, flogbólturin – eins og allur ítróttur – hevur fyri trivnaðin, sigur hann.

### Gagnar øllum pørtum

Formaðurin í Flogbóltssambandinum, Magnus Tausen, vísir á, at báðar avtalurnar hava týdning á hvør sín hátt, har avtalan við Eik Banka gevur flogbóltinum eitt fíggjarligt grundarlag, sum munar, samstundis sum avtalan við Atlantsflog er týdningarmikil, tí ein stórur partur av virkseminum er at senda flogbóltslið uttanlands at kappast á hvørjum ári.

– Tað hevur heilt greitt eitt stórt signalvirði fyri okkum, at tvær so kendar fyritøkur – bæði her heima og uttanlands – vilja halda fram við at stuðla okkum. Fyri okkara part hava vit eisini lagt okkum eftir, at vit gera okkara besta, so hetta er eitt slag av einum paralagi, ið kann gagna øllum pørtum, sigur hann.

– Avtalan við Eik Banka ger, at okkara grundrakstur kann vera í ordan, samstundis sum tað avspeglar ein tryggleika og seriøsitet, at vit hava ein so stóran og sterkan høvuðsstuðul. Ein stórur partur av okkara fíggjarligu byrðu liggur í flúgving, men avtalan við Atlantsflog hjálpir okkum eitt nú at halda fram við at hava U17- og U19-landsliðini við í norðurlendskari kapping á hvørjum ári, umframt annað landsliðsvirksemi.



Jákup Sverri Kass, sølu- og marknaðarstjóri hjá Atlantsflogi, Magnus Tausen, formaður í Flogbóltssambandinum, og Ólavur Jensen, sølu- og marknaðarleiðari í Eik Banka, skrivaðu dúgliga undir fyrrapartin í gjár

Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir



TB-kvinnurnar hava neyvan ráð til at snáva í kvøld, tá tær á heimavølli taka ímóti Fleyr

Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

# TB skal vísa sítt virði

**Megna TB-kvinnurnar í kvøld at vinna útsetta heimadystin ímóti Fleyr, eru tær væl á veg í FM-finaluna**




Hilmar Jan Hansen

Meðan oddaliðið í Eik-liguni hjá kvinnum, SÍ, er upptikið av sínum fyrireikingum til steypafinaluna ímóti Drátti í morgin, skal fremsti avbjóðarin, TB, í kvøld í landskappingini royna at vinna tvey stig, ið kunnu flyta liðið eitt týðandi fet nærri FM-finaluni.

TB spælir í kvøld klokkan 18 á heimavølli ímóti Fleyr, sum leingi var við í finalukappingini, men nú er dragnað so mikið, at tað ikki røkkur til meira enn í besta føri bronsu í ár. Fleyr hevur sostatt ikki nógv at spæla fyri, men tað kann eisini gera liðið til eitt torført mótstøðulið.

Fleyr hevur eina góða manning, ið tó hevur fingið merkiliga lítið burturúr í vetur. Nú trýstið ikki er tað sama longur, fæst at síggja, um Fleyr fer at spæla meira frítt – ella um liðið ikki longur leggur ta stóru orkuna í avrikini á vøllinum, nú einki meira er at spæla fyri.

Í øllum førum krevur TB at fáa tvey stig, tí bara eitt stig aftanfyri er Mjølnir, ið neyvan legst á boðini, fæst ein møguleiki at sleppa fram um TB og í FM-finaluna, har SÍ longu hevur mestsum tryggjað sær pláss.

TB og Fleyr hava vunnið hvør sín av teimum dystunum teirra millum higartil í kappingini. Síðst í oktober vann Fleyr 3-1 í Trongisvági, men hálvan desember svaraði TB aftur við at vinna 3-0 í Havn. Skulu vit trúgva hagtølunum, kann alt henda í Trongisvági í kvøld.

## Flogbóltur

**Eik-ligan, kvinnur**

| | | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | settmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | SÍ | 15 | 14 | - | 1 | 43 | 8 | 35 | 17 |
| 2 | TB | 14 | 11 | - | 3 | 36 | 15 | 21 | 13 |
| 3 | Mjølnir | 15 | 10 | - | 5 | 35 | 21 | 14 | 12 |
| 4 | Dráttur | 16 | 8 | - | 8 | 31 | 26 | 5 | 11 |
| 5 | Fleyr | 15 | 8 | - | 7 | 29 | 25 | 4 | 9 |
| 6 | ÍF | 16 | 2 | - | 14 | 7 | 43 | -36 | 2 |
| 7 | KÍF | 15 | 0 | - | 15 | 2 | 45 | -43 | 0 |